LM-087/2023

Fylgiskjal 13

Jákup Andrias Kristiansen

Fra: Jósup Henriksen
Sendt: 1. februar 2024 14:34
Til: Jákup Andrias Kristiansen
Emne: SV: Til ummælis - Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vernd av persónsupplýsingum (Dátuverndarlógin)

Hey Jákup Andrias

Havi ikki viðmerkingar til konkretu broytingarnar, tó vil eg heita á tykkum, nú tit eru í gongd við at gera broytingar og skulu í løgtingið við hesum, at taka fylgjandi broyting við um somu leið:

At leggja afturat (tað við grønum) í § 41, stk. 2.: "Viðgerðin hjá einum dátuviðgera skal vera grundað á avtalu [redacted], sum er bindandi,... "

Grundgeving:

Tað sær út til at vera ein feilur, at hetta ikki er skrivað inn í lógartekstin upprunaliga. Hetta vildi skapt tryggar karmar um, at tað t.d. er í lagi at gera eina kunngerð knýtt til eina loysn (t.d. sum Mínboks) sum kemur ístaðinfyri dátuviðgeraravtalur við hvønn einstakan kunda. Í Danmark hevur mann eina slíka kunngerð til Digital Post loysnina (https://www.retsinformation.dk/eli/lta/2021/2019).

Um hugt verður viðmerkingunum til dátuverndarlógina, so stendur ovaliga á síðu 103: *"Eins og í dag verður nevniliga í stk. 2 ásett, at tá ein dátuviðgeri viðger persónupplýsingar fyri ein dátuábyrgdara, skal hetta vera gjørt sambært bindandi avtalu ella øðrum rættarligum skjali, sum kann binda dátuviðgeran til dátuábyrgdaran."*

Í GDPR grein 28 (3), sum § 41, stk. 2. tekur støði í, stendur: "En databehandlers behandling skal være reguleret af en kontrakt eller et andet retligt dokument i henhold til EU-retten eller medlemsstaternes nationale ret..."

Dátueftirlitið er eisini av hesari fatan, sí hoyringsvar frá Dátueftirlitinum (niðaliga á síðu 2) til løgtingslóg um Mínboks her: https://www.logting.fo/mal/mal/?id=10326

Vinaliga

GJALDSTOVAN

Jósup Henriksen

TELEFON +298 352400 | BEINLEIÐIS +298 352483

Fra: Talgildu Føroyar <talgildu@talgildu.fo>
Sendt: 17. januar 2024 08:44
Til: Jósup Henriksen <josup@talgildu.fo>; Nicolai Mohr Balle <nicolai@talgildu.fo>
Emne: VS: Til ummælis - Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vernd av persónsupplýsingum (Dátuverndarlógin)

ttk

GJALDSTOVAN

Durita Hansen

TELEFON +298 352400 | BEINLEIÐIS +298 352457

LM-087/2023

Fra: Gunnvá Ellendersen <Gunnvae@lmr.fo>
Sendt: 15. januar 2024 14:10
Til: Barna- og Útbúgvingar Málaráðið <bumr@bumr.fo>; Almanna- og mentamálaráðið <ammr@ammr.fo>; Journalin hjá LMS <journalin@tinganes.fo>; Heilsumálaráðið <hmr@hmr.fo>; VMR-Journal <uvmr-journal@uvmr.fo>; Umhvørvismálaráðið <umhvorvi@umhvorvi.fo>; Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>; Fiskimálaráðið Journal <fisk@fisk.fo>; kundi@banknordik.fo; Leivur Persson <lp@arb.fo>; Dátueftirlitið <dat@dat.fo>; torshavn@torshavn.fo; klaksvik@klaksvik.fo; kf@kf.fo; ls@ls.fo; Fólkaheilsustýrið <hst@hst.fo>; setur@setur.fo; Fólkaheilsustýrið <hst@hst.fo>; Heilsutrygd <heilsutrygd@heilsutrygd.fo>; AV Almannaverkið <av@av.fo>; Familjufyrisitingin <famf@famf.fo>; Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu <dfaa@health.fo>; Gjaldstovan <gjaldstovan@gjaldstovan.fo>; Kundatænastan á TAKS <taks@taks.fo>; Talgildu Føroyar <talgildu@talgildu.fo>; us <us@us.fo>; Undirvísing <undirvising@uvs.fo>; FMA <fma@fma.fo>; industry@industry.fo; fafelag@fafelag.fo; starvsfelag@starvsfelag.fo; ft@ft.fo; nema@nema.fo; spekt@spekt.fo; januar@januar.fo; sd@elektron.fo; betri@betri.fo; ns@ns.fo; politi@politi.fo; post@sorinskrivarin.fo; faroelaw@faroelaw.fo
Cc: Nella Festirstein <nellaf@lmr.fo>; Jákup Andrias Kristiansen <JakupA@lmr.fo>
Emne: Til ummælis - Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vernd av persónsupplýsingum (Dátuverndarlógin)

Til hoyringspartarnar,

Góðan dagin,

Uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um vernd av persónsupplýsingum (Dátuverndarlógin) verður hervið sent tykkum til hoyringar.

Hoyringsfreistin er mánadagin 5. februar 2024, kl. 12:00.

Møguligar viðmerkingar kunnu sendast Løgmálaráðnum um teldupost lmr@lmr.fo ella til Jákup Andrias Kristiansen, fulltrúa, á teldupost jakupa@lmr.fo .

Um tit hava nakað at spyrja um, eru tit vælkomin at skriva til Jákup Andrias Kristiansen, fulltrúa, um teldupost ella ringja á telefon 257013.

Vinarliga

Gunnvá Ellendersen, leiðsluskrivari

Mobile: +298 558097
gunnvae@lmr.fo

FØROYA LANDSSTÝRI

LØGMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Justice
Gongin 7, Postrúm 377, / FO-110 Tórshavn / Faroe Islands
Office: +298 306600 / lmr@lmr.fo / www.lmr.fo